## DAGSINS MEINING

# Ikki bókaskatt!

Tað er komið undan kavi, at Fíggjarmálaráðið arbeiðir við eini ætlan um rættiliga stórar broytingar í MVG-lóggávuni. Ein av hesum broytingum snýr seg um at leggja MVG á bøkur. Føroyar hava í mong ár verið undangonguland við tað, at vit ikki hava havt MVG á bókum. Hetta er bert galdandi fyri nøkur heilt fá lond í Europa. Tað er alkunnugt, at í londum, har einki MVG er á bókum, er hetta til mikið gagn fyri bókmentir og bókaútgávu í viðkomandi londum.

Tá MVG á sinni varð innført í føroysku avgjaldslóggávuna, ætlaðu lógarsmiðirnir eisini, at MVG skuldi leggjast á bøkur. Tá tók seg upp eitt alment orðaskifti. Rithøvundar og forleggjarar vendu sær til politisku leiðslu landsins við tí úrsliti, at MVG varð ikki lagt á bøkur. Vit halda okkum skilja á tí orðaskifti, ið higartil hevur verið, at henda skipan við ikki at skatta lesing hevur verið føroyskum bókmentum til mikið gagn. Tað eru tí allar góðar grundir til ikki at broyta hesa skipan.

Í hesum døgum sita samgongufólk og leggja síðstu hond á fíggjarlógaruppskotið fyri 2005. Alt bendir á stórar niðurskurðir á øllum økjum. Er hetta so, verður eisini mentanarøkið hart rakt. Hetta økið er frammanundan alt ov lágt raðfest. Skal økið hartil skerjast, so verður hetta føroyskum bókmentum og føroyskari mentan sum heild til ógagns. Tað kundi tí verið ein bati at latið skipanina við MVG frítøku fyri bøkur hildið fram óbroytta. Vit vita væl, at búskaparfrøðingar helst vilja hava eina MVG lóggávu uttan undantøk. Ein lóggáva uttan undantøk er altíð lættari at umsita enn ein lóggáva við undantøkum. Hetta er fyri so vítt vælskiljandi og soleiðis skulu embætismenn væl eisini hugsa.

Hinvegin hava vit politikkarar til at taka politiskar avgerðir. Politikarar hava tað privilegium, at teir kunnu taka onnur fyrilit enn búskaparlig fyrilit. Politikkarar kunnu og skulu síggja tingini í einum størri perspektivi enn embætismenn. Politikkarar kunnu sýna menniskjanslig og mentanarlig fyrilit. Tað eru ivaleyst mong, sum í hesum døgum vóna, at samgongupolitikkarar fara at taka bøkurnar burturúr eini komandi MVG lóggávu. Vit loyva okkum at mæla politikkarunum til at ganga hesum fólkum á møti. Við at gera soleiðis kundu teir sent eitt jaligt signal til mentanarlívið. Tað er harðliga tiltrongt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvar er trivnaðurin??

**Aftursvar og viðmerkingar til Gunnleyg Durhuus og Heðin Mortensen**

**Starvsfólkini í Dagstovninum í Hoyvík**

Gunnleyg Durhuus skrivar í sínum viðmerkingum til okkara lesarabræv, at tað vit skriva ikki er í tráð við veruleikan. Tí kenna vit tað sum okkara skyldu at koma við einum aftursvari. Tað var ikki okkara ætlan at varpa ringt ljós á Tórshavnar Býráð, men tað kennist vónleyst at koma í eitt veruligt orðaskifti við umsitingina. Boðini vit fáa eru, at býráðið hevur rætt til at gera tað, tey hava gjørt.

Tað kann gott vera, at tey í umsitingin hava rætt til at gera, sum tey hava gjørt, men eftir okkara tykki eru avgerðirnar í hesum fløkta máli ikki rættar. Vit meta, at nakrar av teimum broytingum, ið eru gjørdar í fjør heyst, gera at børnini í kommununi nú eru verri stillaði, og gongur hetta út yvir menningina og trivnaðin hjá børnunum.

Gunnleyg sigur, at vit í okkara lesarabrævi geva ta fatan, at flestu stovnar hava tikið fleiri børn inn, enn rúm er fyri.

Tað siga vit ikki, men vit undrast á, at bæði nýggir stovnar og stovnar við áralongum siðvenjum hava fleiri børn í ár, í mun til í fjør.

Eisini sigur Gunnleyg, at tað er vorðið rúm fyri fleiri børnum á teimum ymisku stovnunum í ár, orsaka av broyttum aldursbýti á stovnunum. Tað er hetta, vit vilja varpa ljós á.

Vit kunnu ikki góðtaka, at man í umsitingini hevur valt at broyta barnagarðsaldurin. Hendan broytingin vísur, at býráðið velur at síggja burtur frá menningini og trivnaðinum hjá barninum.

Víðari sigur Gunnleyg, at býráðið ongantíð hevur havt ætlanir um, ella tørv á at koyra fleiri børn inn á verandi stovnar.

Aftur undrar tað okkum, at umsitingin allíkavæl hevur koyrt fleiri børn inn á stovnarnar.

Gunnleyg sigur, at vit skulu venda okkum til teirra, um viðurskiftini ikki eri í lagið. Hetta hava vit eisini roynt, men uttan at kenna, at vit verða hoyrd.

Søgan um hetta fløkta mál er helst longri, enn bæði Gunnleyg og Heðin vilja vera við.

Fyri einum ári síðani, lovaði Býráðið foreldrum at børnum, sum høvdu barnagarðsaldur, men ikki fingu bjóðað barnagarðspláss, at tey kundu gjalda barnagarðsgjald, hóast børn teirra gingu í vøggustovu. Býráðið lovaði at gjalda stovnunum hendan munin. Tríggjar mánaðir seinni, velur býráðið at ganga burtur frá hesum lyftinum, sum teir góvu um at gjalda munin.

Samstundis kunnar umsitingin leiðararnar um, at barnagarðsaldurin verður fluttur frá 1. oktobur til 1. januar, virkandi frá 1. august 2004.

Gunnleyg sigur, at tað ikki er rætt, at barnagarðsaldurin er fluttur ein heilan árgang, men bert 3 mðr. Hon átti at vita, at børn ikki verða flutt yvir í barnagarð í januar. Skiftið er um summarið, og merkir henda broyting tí í veruleikanum, at børn sum eru 2 1/2 ár, nú eru barnagarðsbørn.

Fyrr vóru børn, ið eru fødd um heystið, nærri 4 ár, tá ið tey fóru í barnagarð. Men við broytingini, sum umsitingin kunnaði leiðararnar um í fjør, kunnu børnini í dag vera niður til 2 1/2 ár. Tað er hetta vit vilja mótmæla.

Haraftrat sigur Gunnleyg, at vit á Dagstovninum í Hoyvík hava eitt barnatal, sum er innan fyri upprunaligu normeringina, tí vit hava fleiri barnagarðsbørn í mun til vøggustovubørn.

Til hetta kunnu vit bert svara, at vit á tveimum av trimum vøggustovum hava 11 børn í ár, har tað í fjør vóru 10 børn. Og á øllum barnagarðsstovunum eru 15 børn í ár, har tað í fjør vóru 14 børn á hvørjari stovu. Altso hava vit 5 børn fleiri í ár.

Vit vita væl, at man í umsitingini telur sokallaði »poeng" fyri børn, ið eru á stovni, og at vøggustovubørn telja fleiri »poeng« enn barnagarðsbørn. Við at broyta barnagarðsaldurin, kunnu tey jú fáa fleiri børn inn á stovnarnar, tí barnagarðsbørn telja minni enn vøggustovubørn, so við at telja »poeng« hvørva hesi 5 børnini niðri í umsitingini.

Í okkara verð eru hesi børn ikki horvin. Tey eru nú byrjaði hjá okkum, og vit hava ongar ætlanir um at fylgja ráðunum hjá Heðini Mortensen, um at flyta børnini á annan stovn. Soleiðis kann man eftir okkara tykki ikki fara við børnum. Í summar byrjaðu 18 nýggj, fitt børn hjá okkum, og eru vit vorðin góð við tey øll somul, og fara at vera um tey, eins og vit eru um øll hini børnini á stovninum.

Gunnleyg fer at enda at samanbera okkum við grannalondini, sum hava verri umstøður og normeringar enn vit. Hetta síggja vit sum eitt tekin um vantandi grundgevingar. Okkara børn fáa tað ikki betur av, at tey hava tað verri í okkara grannalondum.

Tað undrar okkum, at trivnaðarstjórin framhaldandi sigur, at býráðið vil tryggja børnum, foreldrum og starvsfólkum eina vælvirkandi barnaansing, sum skapar trivnað og menning. Eftir okkara tykki, er man í umsitingini meira áhuga í at telja tøl og »poeng«, enn at skapa trivnað og menning.

Okkara áheitan er, at Tórshavnar Býráð fer at endurskoða broytingarnar, til frama fyri trivnaðinum og menningini hjá barninum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Var tilboðið til Vágs Býráð ov leyst??

**Johan Dahl og Hendrik Old, løgtingsmenn**

Undirritaðu tingmenn sum vóru við á fundinum í Vági vilja hervið koma við nøkrum viðmerkingum til tað skriving sum er farin framm eftir fundin sum landsstýris- og samgonguumboð høvdu við Vágs Býráð seinasta leygardag.

Samgongan arbeiðir við at finna loysnir uppá trupulleikarnar í Suðuroynni sum heild, har sunnara helvt er serstakliga meint rakt og verður tosað um at fáa m.a. fleiri almenn arbeiðspláss í økið, hetta m.a. fyri at fáa tær familjur, sum hava útbúgvið seg eftir lokna miðnámsútbúgving aftur til økið at festa búgv og harvið verða við til at skapa menning og trivnað í oynni.

Eisini eru almennar inntøkur óávirkaðar av teimum sveiggjum, sum mangan eru í einum fiskivinnusamfelagi og kenna vit í Vági alt ov gott fylgjurnar av, ikki at hava eina nøktandi mongd av almennum arbeiðsplássum í økinum.

Vit mugu tíverri ásanna at aftaná sjey sera feit ár, har almennar setanir hava sligið allar rekordir so er onki alment arbeiðspláss komið til syðru helvt av Suð-uroynni, tað er ein sannroynd.

Hóast vit nú væntandi koma at fáa nógv trengri fíggjarligar karmar enn undanfarnu ár, so ætlar sitandi samgonga at fremja munagóðar broytingar fyri menning av økinum bæði innan almenn arbeiðspláss og fremja karmar fyri vinnuligari menning av økinum.

Tað finnast ongar lættar loysnir á trupuleikunum, men okkara ætlan er saman við øllum pørtum at finna skilagóðar lyosnir fyri at fáa vend aftur í ta skeivu gongd sum er.

Tað upplegg sum landsstýrisumboðini saman við løgmanni løgdu fyri Vágs Býráð, metir ein samd samgonga at vera sera skilagott og vil verða við til at menna økið, tí sum nevnt í upplegginum so eru talan um støðug almenn arbeiðspláss fyri miðallangar útbúgvingar og er tað just hesi vit mangla í økinum.

**Tilboðið og leyst?**

Fundurin sum varð hildin við Býráðið í Vági var ein kunnandi fundur, har hugsanin um at byggja røktarheim á økinum har sum miðnámsskúlin skal byggjast og ístaðin byggja ein skúladepil í Hovi har bæði Miðnámsskúlin og Sjúkrarøktaraskúlin verða samansjóðaðir í eina eind varð fyrilagdur býráðslimum, hetta fyri at fáa klárlagt um áhugi og vilji var tilstaðar frá Býráðsins síðu at gera slíkt umbýti.

Tær metinar sum landsstýrismaðurin í almanna-og heilsumálum nýtti sum grundarlag fyri meting av kostnaði, er tann bygging av røktarheimið sum nýliga er byrja í Norðurstremoy, har bygt verður eitt røktarheim á líknandi støðd sum hugsað var at byggja í Vági.

At tað ikki fyriliggur nakað skrivligt tilboð ella detailsprojekt er ikki undarligt, tí áðrenn vit fara til næsta stigið í ætlanini, sum er at fáa hinar kommunurnar í oynni við í ætlanina, so mugu vit sjálvsagt vita um Vágs Kommuna yvirhøvur er áhugað at gera nevnda býtið.

Ásannast má at býráðið ikki var áhugað í einum býtið sum varð lagt upp til og kom als ikki í nakran dialog um uppleggið.

Viðvíkjandi tí parti sum Býráði skal gjaldað í samband við bygging av røktarheiminum, so var nevnt at tann parturin sum kommunan longu hevur brúkt uppá vegir o.a. í samband við miðnámsskúlan, kundi inngingið sum partur av gjaldinum hjá Vágs kommunu til røktarheimsbyggingina.

**2 flugur við eitt smekk og nógv byggivirksemið.**

Vit tað at Heilsurøktarskúli eftir ætlan eisini skal byggjast á Tvøroyri, so hevur landsstýrismaðurin í mentamálum, sum skilagott er eisini hugt at, hvussu ein samanbygging av skúlunum kann verða framd og er hansara hugsan skilgóð, tí við at fremja eina slíka fáa pening til avlops sum kann verða nýttur til røktarheimið.

Ætlanin er framyvir at hava skúladepilin sum eina sjálvstøðuga eind og ikki sum nú, har miðnámsskúlin er ein partur at skúlanum í Hoydølum.

Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um at hugt var eftir um ikki teir ytru karmarnir til bygning sum er gjørt til Miðnámsskúlan, møguliga við smáum broytingum kann nýtast til røktarheimi hetta fyri at ætlanin kann setast í verk beinanvegin hon er samtykt í tinginum.

Byggingin í Hovi er ætlan at byrja skjótast møguligt, og er ætlanin at nýta grótið frá komandi tunnilsgerðini sum byrjar í vár at planera økið við og tískil verður einans ein lítil seinking uppá fáar mánaðir í byggingini av miðnámsskúlanum um hendan ætlan verður framd.

Hinvegin verður nógv byggivirkemið og arbeiði til handverkarar við at fremja báðar ætlanir parallelt.

**Ætlanin mennandi fyri alla Suðuroynna**

Tað, at vit frameftir kunnu hava ein depil í Hovi sum liggur mitt í oynni har allir partar hava líka langt at koma til hendan depil frá Sumba til Sandvíkar, meta vit er rættasta loysnin tí her kunnu vit veruliga gera ein framtíðar skúla- og mentanardepil fyri alla Suðuroynna.

**Allur raksturin røktarheiminum goldin av landinum**

Nevnast skal til kunnunar, at allur raksturin – harav lønarparturin í hesum upplegginum verður umleið 15 milliónir um árið verður borin av landinum og tyngir tí als ikki kommunukassarnir – tvørturímóti, so er hetta ein støðug varandi inntøka fyri øki sum er óávirkað av sveiggjum í búskapinum annars.

# Samgongan vil gera avgjaldsskipan brúkara- og vinnuvinarliga

**Bárður Nielsen,**
*landsstýrismaður við fíggjarmálum*



Tíðindaflutningurin um møguligar broytingar í MVG-skipanini og punktgjøldum gevur eina ranga mynd av tí, sum samgongan ætlar. Ætlanin hjá samgonguni er at fáa MVG-skipan og punktgjøld so brúkara- og vinnuvinarlig sum gjørligt, men enn er politiska viðgerðin ikki byrjað.

Seinastu dagarnar hevur tíðindaflutningurin um møguligar broytingar í MVG-skipanini og punktgjøldunum borið í sær, at almenna orðaskiftið um málið er farið nakað út av sporinum.

Fjølmiðlar og ávísir áhugabólkar hava alment viðgjørt ymisk tilmæli og tilvildarlig brot úr einum fyribils uppritið frá Fíggjarmálaráðnum um meirvirðis-gjald og onnur avgjøld, og tað er orsøkin til, at nógv ymiskt er borið fram, og fløkja er komin í hjá fleiri.

Tí vil eg í stuttum greiða frá gongdini í málinum og tí, samgongan vil á hesum økinum.

**Ongin politisk viðgerð**

Fyribilsuppritið, sum hevur verið uppi og vent í fjølmiðlunum, er partur av einari endurskoðan av punktgjøldunum og MVG-skipanini, sum ikki er liðug og onga politiska viðgerð hevur havt enn.

Eitt av høvuðspunktunum undir skatta- og avgjaldspolitikkinum í samgonguskjalinum er, at punktgjøldini og meirvirðisgjaldsskipanin skulu endurskoðast, so tey verða meira brúkara- og vinnuvinarlig. Vinnan hevur t.d. í nógv ár gramt seg um at undantøk í MVG-lógini skapa skeivleikar og máa støðið undan MVG-skipanini.

Tí legði eg fram upprit á landsstýrisfundi 27. apríl 2004, har eg mælti til at seta embætisfólk í Fíggjarmálaráðnum at arbeiða víðari við at lýsa føroysku avgjaldslógirnar og koma við tilmælum um, hvørjar broytingar skulu gerast á føroyska avgjaldsøkinum og hvussu føroyski avgjaldspolitikkurin frameftir eigur at verða lagdur tilrættis.

Tað skal viðmerkjast, at hetta eisini var eitt punkt í samgonguskjalinum hjá undanfarnu samgongu.

**Til hoyringar**

Stórur dentur er lagdur á, at vinna, brúkarar og onnur, sum møguliga verða umfatað av tilmælunum, skulu fáa høvi at gera viðmerkingar til tilmælini, áðrenn landsstýrið tekur politiska støðu til tilmælini.

Eitt fyribils upprit við tilmælum varð tí sent arbeiðsgevarafeløgum, løntakarafeløgum og øðrum viðkomandi til viðmerkingar 10. august í ár, og freistin at koma við viðmerkingum er ikki úti fyrr enn mánadagin 4. oktober 2004.

Nógv umtalaða fyribilsuppritið er sostatt til viðmerkingar í løtuni og hevur onga politiska viðgerð fingið enn.

**Breitt og gott grundarlag**

Eftir at freistin at koma við viðmerkingum er úti, verður uppritið gjørt endaliga liðugt og lagt fyri landsstýrið til politiska viðgerð og støðutakan. Landsstýrið hevur tá eitt sera breitt og gott grundarlag at taka støðu til.

31 feløg, stovnar o.a. hava fingið fyribils uppritið til viðmerkingar og tí slepst ikki undan, at uppritið verður alment, áðrenn tað er endaliga liðugt. Tá er kortini vert hjá fjølmiðlum, lurtarum, hyggjarum og lesarum at leggja til merkis, at talan er um nøkur fyribils viðurskifti.

Vón mín er, at teir áhugabólkar, sum longu hava valt at fara í fjølmiðlarnar við sínum viðmerkingum, eisini senda viðmerkingarnar á rætta stað í seinasta lagi mánadagin 4. oktober, so vit kunnu fáa eina so breiða og sakliga viðgerð sum gjørligt.

# Býráðsval!

**Hanna Lisberg**
*Tórshavn 14. sept. 2004*



Eg meini tað! Kvinnulisti var komin undir land stóð í bløðunum!

Tað næsta, tú fréttir, er at politiskur flokkur søkir eftir kvinnum at koma á lista teirra til býráðsvalið.

Hvat er galið? Hví er knappliga so lítil áhugi? Tað eru helst fleiri orsøkir til tess!

Mín meining er, at eingin áhugi er fyri politikki. Bert tá fólk koma fram og siga, at tað er skomm, at so fá konufólk eru í býráði og á tingi. Hvør hevur skuldina? Tað lati eg lesaran finna út av.

Men ein orsøk er, ið hvussu er tann, at tey seinastu árini hevur verið ófantaliga illa atborið.

Mátin, sum politikarar hava viðgjørt ymisk mál, er undir alt lágmark – eitt nú tey gomlu í samfelagnum. Hvussu nógv tað kostar samfelagnum o.s.fr., samstundis sum løgtingsmenn hækka sínar egnu lønir, samstundis sum teir geva verkafjøldini skyldina fyri allar landsins ólukkur, tá tey nýta sín rætt – verkfallsrætt – at kvinka verkamannalønirnar upp!

Ein onnur orsøk er, at veljararnir eru luft fyri politikarum, tá teir fyrst eru valdir – inntil næsta val, tá biðja teir góðan dag! Hvussu hevur familjan tað? (Til et økseskaft)!

Um tú roynir at koma í samband við hesar í valperioduni, so hava teir ikki tíð, hóast tú spyrt, um tey ikki kunnu ringja, tá tey hava tíð.

**Veljarafeløg**

Hvussu nógv gera tey millum valini?? Eg havi havt stóran áhuga fyrr, og havi havt nógvar góðar og hugnaligar løtur í mínum veljarafelag, »det var dengang«!

Sjálv haldi eg, at tað hevði verið best, um lív kom í veljarafeløgini, og lat tey sleppa framat, sum høvdu hug og vilja at fáast við politikk, so hevði ikki verið neyðugt at lýsa eftir konufólki. Álvaratos, hvar enda vit?